# Onki samsvar millum játtan og tørv

**Eg trúgvi, at samgongulimir skilja, at har má okkurt gerast, um avleiðingarnar eru soleiðis, sum vit hava hoyrt. Tað sigur løgtingsmaðurin John Johannessen um skerjingarnar í játtanini til Musikkskúlan**

MUSIKKSKÚLIN
*Hans Kárason Mikkelsen*
*hans@sosialurin.fo*

Ungi javnaðarmaðurin á tingi, John Johannessen, legði undir valstríðnum stóran dent á, at C-vitaminir skuldu til tónleikin. Og tað nógvar.

Men tað er lítíð, sum bendir á, at Musikkskúlin í Føroyum fær tær vitaminirnar, sum hann hevur brúk fyri. Í øllum førum ikki fyri ólavsøku.



*Eg haldi, at tað er sera harmiligt at skejra á einum øki, sum er eitt so grundleggjandi øki, sum er mennandi fyri ungdómin, sigur John Johannessen, tingmaður*



*Eg ætli mær at viðgera hetta málið og vita, um mann ikki kann gera okkurt, sigur Jógvan á Lakjuni, landsstýrismaður við mentamálum*

Musikkskúlalærararnir hava fingið eina lønarkækkan, men løgtingsfíggjarlógin endurspeglar ikki hesa lønarhækkan, og tískil noyðist Musikkskúlin at spara.

Sparingin fer heilt ítøkiligt at merkja, at tað verða færri lærarar og tískil færri næmingar. Talan er um 200 næmingar og 11 lærarar, sum mugu sigast leys av skúlanum.

– Nú má mann fyrst fara at kanna eftir, um hatta verða avleiðingarnar. Um so er, so má samgongan seta seg niður at finna útav, hvat hon ynskir við Musikkskúlanum. Um hon veruliga ynskir hatta har, ella um mann ikki í øllum førum eigur at halda Musikkskúlan á tí støðinum, sum hann var, sigur John Johannessen, tingmaður.

Jógvan á Lakjuni, landsstýrismaður við mentamálum, sigur, at hann fer at gera sítt til tess at tryggja, at sparingin ikki verður so ógvuslig.

– Eg ætli mær at viðgera hetta málið og vita, um mann ikki kann gera okkurt. Eg trúgvi ikki, at vit fáa fleiri pengar (...) men kanska tað eru onkrir pengar onkustaðni. Tað fær mann at síggja, sigur Jógvan á Lakjuni, landsstýrismaður við mentamálum.

John Johannessen heldur, at økið hjá Musikkskúlanum, tónleikurin, skal raðfestast høgt.

– Eg haldi, at tað er sera harmiligt at skejra á einum øki, sum er eitt so grundleggjandi øki, sum er mennandi fyri ungdómin. Eg fari at gera mína ávirkan galdandi, og eg vænti, at landssýrismaðurin við mentamálum eisini følir ábyrgd fyri Musikkskúlanum, sigur John Johannessen, tingmaður.

# Upplýsandi bók um grót og steinar

**Føroya Skúlabókagrunnur hevur í samprenti við enska forlagið Dorling Kindersley aftur givið út eina dygdarbók um náttúruna**

BÓKAÚTGÁVA
*Tíðindaskriv*

Grót & steinar er ein upplýsandi bók, ið við greiðum teksti og frálíkum myndum sigur frá stórfingna ríkidømi av gróti og steinum, ið liggur fjalt undir fótum okkara. Bókin er gjørd í samstarvi við bretska Natural History Museum. Martin V. Heinesen, jarðfrøðingur, hevur týtt úr enskum.

Ymisku grótsløgini eru vorðin til á ymiskan hátt fram ígjøgnum jarðarsøguna. Við at granska grótið kunnu jarðfrøðingar kunna seg um viðurskifti og hendingar á jørðini, sum tíðin er liðin. Í bókini ber eisini til at lesa um at slípa steinar og at greina grót- og steinsløg.




Orðtýðingar og leitorðalisti eru prentað aftast í bókini. Hóast teksturin er skrivaður av serfrøðingum, er hann lættur at lesa, og tær frágreiðandi myndirnar gera bókina væl egnaða til undirvísing, og til handbók hjá teimum, ið vilja læra seg meira um grót og steinar.

Frammanundan eru 6 aðrar útgávur komnar út, sum hvør í sínum lagi lýsa evni úr náttúruni við løttum, upplýsandi teksti og frálíkum myndum. Tær eru: Mannakroppurin, Súgdýr, Jørðin, Rúmdin, Regnskógurin og Havið.

Grót & steinar er 72 síður og kostar 174 krónur.

Stuðulskonsert í Vestmanna:

# Góðar 35.000 krónur til gøtubørn í Ukreina

2. hvítusunnukvøld var skipað fyri stuðulskonsert í ítróttarhøllini íVestmanna til frama fyri eitt barnaheim til gøtubørn í Kiev í Ukreina. Á konsetrini luttóku Magni Christiansen gospel- og countrysangari saman við øðrum góðum tónleikarum og sangarum

Umleið 400 fólk vóru 2. hvítsunnukvøld savnaði í ítróttarhøllini í Vestmanna til eina cospel - og countrykonsert við Magna Christiansen og øðrum góðum tónleikarum og sangarum.

Magni var høvuðssangari, og hevði hann eisini aðrar sangkreftir at hjálpa sær. Konsertin var merkt av góðum og løttum sangi, sum tey flestu dugdu, og vóru tey vælkomin at synga við.

Tá konsertin var umleið hálvrunnin, var høvi at lata pengar til eitt barnaheim sum skal fáast til vega í Kiev í Ukreina. Brúk er fyri einum húsum, sum kunnu hýsa 20-25 børnum umframt nøkrum starvsfólkum.



*Magni Christiansen gospel- og countrysangari saman við øðrum góðum tónleikarum framførdu í ítróttarhøllini í Vestmanna*

*Mynd: Magnus Gunnarsson*

Tað er soleiðis, at síðan februar 2000 hava hjúnini Jórun og Nurlan Malaikev, hon úr Vestmanna, trúboðarar hjá Heimamissiónini, arbeitt við gøtubørnum og foreldraleysum børnum í Kiev í Ukreina.

Arbeiði byrjaði við at geva gøtubørnum at eta úti á gøtuni. Høvuðstólið í arbeiðinum nú er eitt dagsskýlið, har endamálið er at vísa børnunum á hvat ein familja er. Børnini, sum koma í dagsskýlið, fáa eisini hjálp at ganga í skúla, klæði og læknahjálp.

Tiltakið eydnaðist sera væl í allar mátar, og inn komu góðar 35.000 krónur, sum fara til eitt heim til gøtubørnini.

Konsertin byrjaði kl. 20 og skuldi enda kl. 22, men fólkið helt á at klappa fyri at fáa tey at halda áfram at syngja og spæla. Eisini luttók Øssur Christiansen, pápi Magna.



# Tíggju royna at gerast Ársins Songrødd

**Leygarkvøldið verður kappingin »Ársins Songrødd 2004« í Badmintonhøllini í Havn**

SANGKAPPING
*Eirikur Lindenskov*
*eirikur@sosialurin.fo*

Leygarkvøldið tann 5.juni verður stóra finalan av Ársins Songrødd 2004. Aftan á at 50 luttakarar hava verið við í teimum fimm innleiðandi undanumførini, eru 10 luttakarar eftir, sum skulu kappast um at blíva besta songrøddin vit hava í føroyum í ár.

– Samanumtikið kann man siga, at kappingin hevur verið spennandi og til tíðir sera hørð, tað er als ikki bara so, at standa á einum palli framman fyri eini stórari áskoðarafjøld at syngja, og serstakliga ikki, tá ið tað er fyrstu ferð, sigur Mark Joensen, fyrireikari.

Tað er neviliga so, at nógv teirra, ið luttaka í Ársins Songrødd, eru við fyri fyrstu ferð, og nógv teirra hava ei heldur ikki staðið á palli fyrr og sungið í mikrofon.

Við tí í huga eiga vit at hava stóra virðing fyri øllum teimum, sum hava luttikið, og sjálvt um tað vóru 40 sum ikki komu víðari í finaluni, hava tey uppiborið eitt stórt herðaklapp fyri tað dirvi, tey vístu við at stíga upp á pallin. Vónandi kann Ársins Songrødd vera við til at menna tey tónlistaliga, sigur Mark Joensen.

Nú standa 10 luttakarar eftir, sum leygarkvøldið skulu upp á pallin aftur, og einki er at ivast í at, tað verður ein sera spennandi finala.

Eitt sum skilur seg sundur í mun til undanfarin ár er, at nú kemur ikki fyri at sama lagið verður framført tvær ferðir, og eisini eru løgini sera fjølbroytt í ár. Tað er tí at reglarnar nú eru broyttar til, at nú velur ein sjálvur, hvat lag ein vil syngja.

Tey sum kappast um heitið um at gerast Ársins Songrødd 2004 eru: Lív Næs og Nicolina Midjord Ólavur Larsen, Jenny Old, Eyðstein Jacobsen, Birita Bisp & CoBára S. Samuelsen. Barbara Abrahamsen Kristleyg HansenGudney Rasmussen og Jógvan Joensen

Umframt at verða kosin »Ársins Songrødd 2004"« fær vinnarin ein gávucheck upp á 10.000 krónur. Nummar 2 ein gávuchekk upp á kr.5.000 krónur og nummar 3 fær ein gávuchekk upp á kr.3.000 krónur.

Tá ið finalan er av fara allir finalistarnir v.fl. oman í »Manhattan« til eitt sokallað »After-party«. Har verður borðreitt við mati, og Føroya Bjór hevur latið okkurt gott til »háls og humør«

Tað er vanligt tá ið tað er finala í Ársins Songrødd, at okkur góður tónleikari ella bólkur spælur aftan á sjálva kappiningina, og so verður eisini hesaferð. Tað er vælumtøkti tónleikabólkurin »PÁLL FINNUR PÀLL«.

– Teir eru júst í ferð við at gera nýggj løg, og spennandi verður, um vit fáa loyvi at hoyra nakað av tí nýggja tilfarinum. Teir eru annars kendir fyri at smíða løg sum á ein ella annan hátt fáa teg at tralla við, eisini sjálvt um tú ikki júst kann fyrihalda teg við tí sum verður sagt frá í teimum frísinnaðu tekstunum. Hinvegin so kann ein siga, at »PÁLL FINNUR PÁLL« við tónlistaliga stíli sínum rakar eina stóra fjøld júst har sum teir skulu, sigur Mark Joensen.




FRÍGGJADAGIN 4. JUNI
LATA VIT 20%
AV ALLARI VØRU



SNÆLDAN
BOKS 70
490 STRENDUR
tel 44 71 54
fax 44 90 21

SNÆLDAN
NIELS FINSENSGØTA 25
100 TÓRSHAVN
tel 35 71 54

SNÆLDAN

WWW.SMYRIL-LINE.COM

Prísur fyri hvønn
úr kr. 907,-

HETLANDS-CRUISE

Verið við á áhugaverdu Hetlands-ferðum okkara. Eitt nú bjóða vit 3-daga cruise-ferðir og 6-daga cruise-ferðir til sera sámuligan pris.



**UPPLIVINGARNAR BYRJA** við tiltøkum og undirhaldi umborð og halda á, so skjótt fast er undir fóti. Óspilta náttúran, vakra landslagið, yðjandi djóralívið á sjógvi sum á landi og litfagri hetlendski søgu- og mentanararvurin gevur nýggjan íblástur.

Handlarnir í Lerwick liggja stutt frá atløgubryggjuni og hava opið vanligar dagar til kl. 17.00. Til ber at fáa góðar og bíligar dygdarvørur heim aftur við sær úr Hetlandi, teirra millum eisini forkunnigar lutir av hetlendskum uppruna.

Um steðgurin í Hetlandi verður stuttur ella langur, so eru útferðarmøguleikarnir fjølbroyttir. Útferðarfaldari fæst á skrivstovu okkara, so ætlanirnar kunnu leggjast longu heimanífrá.

**3-daga CRUISE**
**mánadag til mikudag**
Gisting á hotelli ............. úr 1.296,-
Privat gisting (B & B)..... úr 1.032,-
Gisting á Vallaraheimi...... úr 907,-

**6-daga CRUISE**
**fríggjadag til mikudag**
Gisting á hotelli ............. úr 3.162,-
Privat gisting (B & B)..... úr 2.051,-
Gisting á Vallaraheimi... úr 1.607,-

Prísurin fatar um ferð fram og aftur á farleiðini Tórshavn-Lerwick og gisting í Hetlandi (matur og drykkjuvørur ikki íroknað).



Á FERÐUNUM fara heimskendir pianoentertainarar, sum Joe Jordan (Svøríki) og Frank Ciciliano (USA) at borðreiða við fjølbroyttum tónleiki umborð.





**Í Hetlandi:**
- Søgulig støð/bygningar
- Mentanarlig tiltøk
- Vøkur náttúra
- Ríkt djóralív
- Livandi býarlív
- Innkeypsmøguleikar
- Útferðir / aktivitetir

**Umborð:**
- Tollfrí søla
- Dansur / undirhald
- Fitness-venjing
- Góður matur

HETLAND BLUES-FESTIVALUR
VERÐUR 25.-27.JUNI 2004
á *www.bluesfestival.shetland.co.uk*
fæst meir at vita um hetta.

J. Broncks gøta 37 · Postsboks 370 · FO-110 Tórshavn
Tlf: 34 59 00 · Fax: 34 59 50 · booking@smyril-line.fo

SMYRIL LINE